# Mayfinn er framvegis formaður



*Nevndin í Arkitektafelag Føroya: vinstrumegin Heidi Poulsen skrivari, í miðjuni Mayfinn Norðoy formaður og til høgri Selmar Nielsen kassameistari*

**AÐALFUNDUR**
*tíðindaskriv*

Formaðurin í Arkitektafelagnum varð afturvaldur, tá felagið hevði aðalfund seinast í september mánaði.

Á aðalfundinum varð eisini Heidi Poulsen vald í nevndina fyri 2 ár í staðin fyri Albert Isfeld, sum ikki stillaði upp aftur aftaná mong ár í nevndini. Selmar Nielsen varð valdur á aðalfundinum í 2004 fyri 2 ár og heldur sostatt fram í nevndini 1 ár afturat.

Á nevndarfundi 18. oktober skipaði nevndin seg við Myafinn Norðoy sum formanni, Heidi Poulsen sum skrivara og Selmar Nielsen sum kassameistara.

# Málningaframsýning í Gamla Handli í Saltangará



*Framsýnginin veruðr í Gamla Handlinum hjá Olivar*

**FRAMSÝNING**
*Tíðindaskriv*

Í Mentanarvikuni í Runavík 23. – 30. oktober letur Hilmar J. Højgaard úr Saltnesi upp eina málningaframsýning í Gamla Handlinum hjá Olivar.

Framsýningin letur upp sunnudagin 23. oktober kl. 17 og er opin hvønn dag til og við 30. oktober tá Mentanarvikan endar.

Listamaðurin, Hilmar J. Højgaard, hevur málað síðan 1975 og hevur sostatt drúgvar royndir sum listamaður. Umleið 20 acrylmálningar eru við á framsýningini. Fyri stuttum var Hilmar niðri á skúla og tí er framsýningin eitt sindur merkt av blandaðum stíli og nýggjum íblástri.

# Spaðar 5 í REX

Spaðar 5 við Ólavi Øster spælir leygarkvøldið í REX. Ólavur Øster hevur seinastu 30 árini spælt gittar í nøkrum av frægastu bólkum í landinum, og Spaðar 5 er hansara nýggja projekt. Hetta er ein góður dansibólkur, við góðum væl spælandi tónleikarum.

Leygarkvøldið fara teir á pallin í REX, kvøldið vendir sær til vaksnar gestir, og tí er aldursmarkið 25 ár hetta kvøldið.

**nud**

# KROSSORÐ




## Vinnari:

*J. M. Johannesen*
*Brúgv 13*
*Fuglafjørður*

## Loysnin frá seinastu viku Loysunarorðið: BURSATANGI




## Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. ...« á bjálvan.

**438**

**Loysunarorðið:** ...........................................

Navn: ...........................................................

Bústaður: ......................................................

Bygd/býur: ....................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkar** - *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** - *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** - *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** - *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ☐ **Føroysk Flora** - *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ☐ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ☐ **Grót og steinar** - *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***